# Gongur væl hjá Blackpool

Claus Bech Jørgensen var á vøllinum fyrstu 60 minuttirnar, tá Blackpool um vikuskiftið vann 1-0 á heimavølli móti Barnsley. Blackpool, sum nú er í holt við sítt næsta kappingarár í enska Championship á hesum sinni, hevur eftir fyrstu fimm dystirnar sjey stig, og tað er væl og virðiliga góðtikið hjá liðnum, sum aftur í ár hevur sum mál at halda sessinum í deildini.



# Avlýst hjá Frem

Dysturin millum liðið hjá Jón Róa Jacobsen og Atla Danielsen, Frem, ímóti Lolland Falster Alliancen - LFA - varð avlýstur í gjár. Dysturin skuldi verða á heimavøllinum hjá Frem, Valby Idrætspark, men orsakað av, at nógvir spælarar hjá LFA eru sjúkir, varð dysturin avlýstur. Óvist er, nær útsetti dysturin ímóti LFA verður spældur. Jón Rói og Atli hava annars spælt nógvar harðar dystir seinastu vikuna. Fyrst vóru teir í Kolding við Frem næstsíðsta mikudag. Seinasta leygardag spældu teir ímóti Serbia, og farna mikudag ímóti Rumenia. So hjá teimum mundi ein steðgur ikki koma illa við.



*Tvey DM-gullmerki á 3.000 og 800 metrum varð úrtøkan hjá Rúna Seloy um vikuskiftið. Eitt framúr avrik, sum eisini undirstrikaði eitt sera gott føroyskt vikuskifti*

# Tvey gull til Rúna Seloy

**Hóast hann er yngri av fleiri av kappingarneytunum, so eydnaðist Rúna Seloy at vinna gull á bæði 3.000 og 800 metrum um vikuskiftið**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Leygardagin vann Rúni Seloy danmarksmeistaraheitið fyri dreingir 15 ár á 3.000 metrum. Hetta tá hann í stórum stíli rann á odda allan vegin, og at enda var 4 sekund frammanfyri næsta rennaran. Rúni betraði sína egnu bestu tíð við heili 14 sekundum, so bólkametið hjá honum eitur nú 4.20,49 min.

Í morgun var 800 meturin á skránni. Og heldur ikki hesuferð vísti Rúni sínum mótstøðumonnum nakra sum helst náði. Hann rann knallhart beinanvegin, og hevði 60 sekund um fyrstu 400 metrarnar. Beint áðrenn teir seinastu 100 metrarnar var ein, sum royndi at koma framvið, men Rúni svaraði sterkt aftur og spurtaði í stórum stíli einsamallur á mál. Tíðin hjá Rúna var 2.04,93 og tad er ein betring av hansara egna persónliga meti við trimum sekundum.

# Bjørk tók DM-heitið



**Tríkvart minuttir var aftur til næsta rennaran, tá Bjørk Herup Olsen í gjár vann DM-heitið á 3.000 metrum**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Sunnudagin skuldi Bjørk liva upp til leiklutin sum favorittur á yndisgrein hennara, sum er 3.000 metrar. Og her var eingin slingur í valsinum. Sjálvt um Bjørk ikki rann sína bestu tíð, endaði hon 43 sekund ella umleið 200 metrar framman fyri næsta rennaran. So nú er Bjørk danskur meistari á 3.000 metrum bæði innan- og uttandura.

Í sjálvum sær er gullmerkið eitt bragd, men tá talan er um somikið sannførandi sigur, er einki at siga til, at tey í Danmark eisini undraðust á føroyska rennaran, sum bara tykist gerast betri og betri.

Og alt í alt gjørdist talan um eina sera góða kapping sæð við føroyskum eygum. Umframt tey trý gullmerkini, sum Rúni Seloy og Bjørk vunnu, komu eisini onnur heiðursmerki í pottin. Bjørk rann seg til silvur á 1.500 metrum, og 2.000 metra forðarenning rann Jan Elmar Sørensen seg rættiliga óvæntað til bronsumerki.

*Hálvum bani var aftur til næsta rennaran, tá Bjørk í suverenum stíli rann seg til DM-gullið á 3.000 metrum*

*Mynd: Guttorm Sørensen*

# Landsliðsúttøka og borðseting

**Talvlandsliðið, sum um tveir mánaðir skal royna seg á OL í Dresden í Týsklandi, er nú endaliga sett**

TALV
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Úttøkan er broytt í mun til tað sum upprunaliga er fráboðað, tí at IM John Arni Nilssen hevur givið avboð, í hansara stað er úttikin Martin Poulsen.

Landsliðið - og borðsetingin - á Føroyska OL-landsliðnum 2008, er hendan:

IM Helgi Dam Ziska (2416)
FM Heini Olsen (2368)
IM John Rødgaard (2383)
Martin Poulsen (2281)
Jóan Hendrik Andreasen (debutantur og reservi) (2179)

Liðleiðari verður, eins og í OL 2006, Finnbjørn Vang.

Telvað verða 11 umfør, har liðið verður mannað við 4 telvarum hvørt umfarið.

Talvsambandið hevur sett liðið í tøttum, konstruktivum, samstarvi við telvararnar. Tað er av størsta týdningi og ein sannroynd, at frægasta liðavrikið - og úrtøkan - á henda hátt kemur til høldar. Og tað er at frøðast um, at serliga viðv. borðunum 1-3 er liðið søguliga javnt sterkt. - skrivar Talvsambandið á heimasíðu síni.



*Bert 17 ára gamali IM Helgi Dam Ziska mannar 1. borð á føroyska OL-landsliðnum 2008*